Stjørnan-VÍF 31-15:

# Greiður sigur til Stjørnuna

Klaksvíkskvinnur fingu enn ein sigur á kontoina, tá ið VÍF sunnudagin var á vitjan í KÍ-høllini. Úrslitið var ein greiður 31-15 sigur til heimaliðið, men av tí at VB vann ein næstan líka stóran sigur í Vestmanna dagin fyri, munaði stórsigurin hjá Stjørnuni lítið í stríðnum í at fáa málmunin hjá VB aftur.

Bestu málskjúttar hjá Stjørnuni vóru Annika Ljósstein og Joan M. Djordjevic, meðan Ioana Rapa sum vant var besti málskjútti hjá VÍF.

Vit hava tíverri ikki fingið nakran dómaraseðil úr Klaksvík, so vit fáa ikki gjørt nakað hagtalsyvirlit frá dystinum.

**tn**



*Stjørnan vann greiðan sigur, tá VÍF vitjaði um vikuskiftið*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Søljan-Kyndil 30-13

# Stórsigur til Søljuna

Vágakvinnur tryggjaðu sær sunnudagin ein stórsigur, tá ið Kyndil var og vitjaði á Giljanesi. At Søljan er við í ovara hálvu av kappingini, meðan Kyndil stríðist í niðara endanum, sást eisini aftur á vøllinum, har greiður munur var á liðunum báðum.

Serliga vóru tað tær báðar Nicoleta Radu Hansen og Lina Andriulyte hjá Søljuni, ið gjørdu vart við seg og langaðu bóltin í meskarnar hjá Kyndli.

Vit hava tíverri ikki fingið nakran dómaraseðil úr Vágum, og tí fáa vit ikki gjørt eitt hagtalsyvirlit um dystin.

**tn**

Neistin-StÍF 26-25:

# Tepur Neistasigur

Hóskvøldið leiktu kvinnurnar hjá Neistanum og StÍF ein framskundaðan dyst á Hálsi, og hann gjørdist óvæntað spennandi.

Gamaní hevði Neistin leiðsluna ein stóran part av dystinum, men í seinna hálvleiki tóku strandakvinnur seg inn á Neistan og komu eisini upp á javnleik. Men tá ið teir 60 minuttirnir vóru leiktir, hevði Neistin vunnið við tí eina málinum, hóast tað stóð á jøvnum minni ein minutt fyri leiklok. Simona Petersen skeyt avgerandi málið hjá Neistanum.

**Neistin-StÍF 26-25**

**Neistin:** Simona Petersen 7(2), Ása á Neystabø 4, Marjun Tróndarson 4, Annika Thomsen 3, Unn Kragesteen 3, Mildrið Jacobsen 2, Lív Sørensen 1, Jórun Ludvík 1, Mia Káradóttir 1

**StÍF:** Paula Olsen 9, Rebekka Justinussen 6, Súnfríð B. Jacobsen 6(5), Rósa Johansen 2, Paula Høgnesen 2

**Brotskøst:** Neistin 3(2), StÍF 8(5)

**Útvísingar:** Neistin 2, StÍF 1

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

# Atljóða ratinglistin

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

1. apríl varð feskasti altjóða ratinglistin kunngjørdur. Eins og seinastu umleið tjúgu árini, er Kasparov ovastur á styrkilistan. Fyri sigurin í Linares herfyri vann hann sær átta ratingstig og hevur nú 2812.

Kasparov valdi tó sera yvirraskandi beint eftir Linares at gevast á tindinum og eiga vit tí at venja okkum við, at Anand er sterkasti aktivi telvari í heiminum. Anand, við sínum 2785, hevur mist eitt (1) ratingstig orsakað av heldur soltna úrslitinum í Linares, sum endaði miðskeiðis í mars. Ratinglistin verður á hvørjum ári dagførdur í januar, apríl, juli og oktobur.

Mest spennandi telvarin í løtuni er 30 ára gamli Veselin Topalov. Hann hevur seinasta árið vunnið seg heilt fram í oddin og hevur nú heili 2778 ratingstig. Í bæði Wijk aan Zee fyrr í ár og Linares myndaði hann toppplássini. Topalov er ein kompromileysur álopstelvari og við hesum stíli hevur hann eisini nógvar fjeppartar.

Peter Leko hevur eftir sigurin í Wijk aan Zee yvirtikið fjórða plássið frá Vladimir Kramnik. Kramnik hevur havt trý minni góð ár og niðurgongdin tykist ikki at steðga. T.d var Kramnik í januar 2002 skrásettur við heili 2811, men síðani hevur tað bert gingið skeiva vegin og hevur hann nú 2753.

Vassily Ivanchuk hevur barst seg fram í toppin aftur og er á einum sætta plássi við 2739. Judit Polgar er framvegis í topp 10, nevnliga á 8. plássi við 2732.

Viktor Korchnoi, sum 23. mars fylti 74 ár, er á 96. plássi við 2619. Korchnoi er ein søga fyri seg. Hann telvar framvegis sera nógv kring allan heimin og í mun til januar listan, hevur livandi legendan vunnið sær tvey ratingstig. Fyri stuttum var hann niðri og vendi á 2568, men seinasta árið hevur hilnast væl hjá honum og "Viktor the Terrible" er væl omanfyri 2600-markinum aftur.

**Føroyski toppurin á altjóða listanum**

42 føroyingar finnast á altjóða ratinglistanum. FM varð telvað aftaná evstamark fyri apríl listan og verður fyrst tikið við í juli-listanum. Helst verða tað eisini fleiri føroyingar sum tá fáa eitt altjóða ratingtal.

Og danska skakligan, sum nógvir føroyingar tóku lut í, verður eisini fyrst tikin við í juli. Til ta tíð er føroyski toppurin helst broyttir nakað. Nevnast kann tó, at John Arni Nilssen (2372) nærum við vissu hevur hægsta altjóða tal, eisini í juli. Heini er skrásettur við 2342 og Flóvin Tór Næs sum stríðist fyri at náa 2400 - kravið fyri at fáa IM-heitið — hevur saman við John Rødgaard 2331.

**Heimselitan — topp 25**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 Kasparov, Garry | g | RUS | 2812 | 1963-04-13 |
| 2 Anand, Viswanathan | g | IND | 2785 | 1969-12-11 |
| 3 Topalov, Veselin | g | BUL | 2778 | 1975-03-15 |
| 4 Leko, Peter | g | HUN | 2763 | 1979-09-08 |
| 5 Kramnik, Vladimir | g | RUS | 2753 | 1975-06-25 |
| 6 Ivanchuk, Vassily | g | UKR | 2739 | 1969-03-18 |
| 7 Adams, Michael | g | ENG | 2737 | 1971-11-17 |
| 8 Polgar, Judit | g | HUN | 2732 | 1976-07-23 |
| 9 Bacrot, Etienne | g | FRA | 2731 | 1983-01-22 |
| 10 Svidler, Peter | g | RUS | 2725 | 1976-06-17 |
| 11 Grischuk, Alex. | g | RUS | 2724 | 1983-10-31 |
| 12 Morozevich, Alex. | g | RUS | 2717 | 1977-07-18 |
| 13 Shirov, Alexei | g | ESP | 2714 | 1972-07-04 |
| 14 Gelfand, Boris | g | ISR | 2713 | 1968-06-24 |
| 15 Bareev, Evgeny | g | RUS | 2709 | 1966-11-21 |
| 16 Dreev, Alexey | g | RUS | 2705 | 1969-01-30 |
| 17 Akopian, Vladimir | g | ARM | 2703 | 1971-12-07 |
| 18 Bologan, Viktor | g | MDA | 2700 | 1971-12-14 |
| 19 Kamsky, Gata | g | USA | 2700 | 1974-06-02 |
| 20 Ponomariov, Ruslan | g | UKR | 2695 | 1983-10-11 |
| 21 Aronian, Levon | g | ARM | 2693 | 1982-10-06 |
| 22 Van Wely, Loek | g | NED | 2687 | 1972-10-07 |
| 23 Motylev, Alexander | g | RUS | 2680 | 1979-06-17 |
| 24 Volokitin, Andrei | g | UKR | 2679 | 1986-06-11 |
| 25 Lautier, Joel | g | FRA | 2678 | 1973-04-12 |